almannastovan

almannastovan@almannastovan.fo · www.almannastovan.fo

# LEIÐARI
## TIL ARBEIÐSMARKNAÐARDEILDINA

Hevur tú hug at fáa ávirkan á royndirnar at menna ein rúmligari arbeiðsmarknað? Hevur tú hug at virka fyri, at eisini tey, sum hava fyribils ella varandi niðursett arbeiðsføri, kunnu fáa eitt virkið arbeiðslív og møguleika at brúka síni evni og førleikar? Um so er, er hetta starvið kanska nakað fyri teg!

### Um arbeiðsmarknaðardeildina
Á deildini arbeiða í løtuni 9 fólk. Tá deildin er fullmannað er talið 11. Deildin hevur í ár fingið størri játtan, ætlað til menning av fyriskipanum fyri fólk við varandi skerjing í arbeiðsførinum.

Arbeiðsmarknaðardeildin hevur til uppgávu at veita ráð og vegleiðing um persónlig, fíggjarlig og verklig viðurskifti, veita praktiskan stuðul og viðgera mál um fíggjarligar veitingar sambært forsorgarlógini. Fyri at hjálpa fólki at gerast arbeiðsliga og fíggjarliga sjálvbjargin við at menna ella endurmenna arbeiðsføri, verður stuðul veittur til skúla, útbúgving, arbeiðsroynd, upplæring o.l.

Deildin hevur møguleika at veita stuðul til vart starv, so fólk við førleikatarni kunnu varðveita sítt arbeiði, hóast tarni. Somuleiðis kunnu fyritíðarpensjónistar fáa stuðul til at blíva arbeiðsvirknir við vardum starvi. Deildin hevur harumframt til uppgávu at fyrireika mál um fyritíðarpensjón, herundir lýsa málini og gera tilráðing.

Okkara viðskiftafólk hava likamliga, sálarliga ella sosialt treytaðar forðingar, sum gera, at tey hava brúk fyri serligum stuðli fyri at kunna virka á jøvnum føti við onnur á arbeiðsmarknaðinum. Forðingarnar kunnu hava uppruna í viðføddum breki, vera avleiðingar av sjúku, skaða ella vanlukkutilburði, ella hava grund í serligum sosialum umstøðum.

### Uppgávurnar hjá leiðaranum eru
- at leggja ætlanir fyri, hvussu uppgávurnar hjá deildini skulu loysast, soleiðis at mál og karmar verða týðulig fyri starvsfólk og mál verða nádd
- at samskipa arbeiðið á deildini og saman við starvsfólkunum leggja arbeiðið tilrættis og tryggja, at tey fáa brúkt og ment teirra ymsu førleikar
- at menna samstarv og avtalur við almenn og privat arbeiðspláss, yrkisfeløg og myndugleikar, sum varða av arbeiðsmarknaðar- og øðrum viðurskiftum, ið hava týdning í málum, sum deildin arbeiðir við
- at tryggja neyðuga samskipan av arbeiðnum við aðrar deildir og samstarva við aðrar leiðarar á stovninum.

### Vit vænta, at tú
- hevur útbúgving frá hægri lærustovni, sosialráðgevaútbúgving ella líknandi
- hevur umsitingarligar royndir, dugir EDV á brúkarastøði og dugir at orða teg í skrift og talu
- ert framsíggin og hevur áræði og áhaldni
- ert opin, virkin og samstarvshugaður
- hevur hug og førleika at seta tiltøk í verk og leiða menningartilgongdir trygt á mál
- sært týdningin av støðugt at menna dygdina í málsviðgerðini og tænastuni til borgaran
- hevur evni at eggja og menna starvsfólk og leggur dent á at skapa eitt arbeiðspláss, har starvsfólk trívast og mennast

Leiðsluroyndir, kunnleiki til almannaverkið og arbeiðsmarknaðin kunnu vera fyrimunir, men eru ikki treytir.

### Lønar- og setanarviðurskifti o.a.
Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, á telefon 35 35 10. Freistin at søkja er 18. mai 2007, kl. 9.00.

### Umsókn
Umsókn við avriti av prógvum v.m. skulu sendast til:
Almannastovuna, Postboks 3096, 110 Tórshavn.
(Vinarliga merkið brævbjálvan: leiðari AMD.)

KREA.FO · TEL 4780 80